
Ben arabo, stjóri í Atlantic Petroleum. Mynd: Jógvan H. Gardar

# Atlantic Petroleum framleiddi 1433 føt um dagin í november

**Jógvan Hugo Gardar**

03.12.2014 - 10:09

Oljan.fo

Atlantic Petroleum sigur í eini fráboðan til keypsskálan at fyritøkan framleiddi 43.000 føt av oljulíkum (foe) í november úr brunnunum Chestnut, Ettrick og Blackbird.

Í meðal er tað 1433 føt um dagin. Hetta er nakað lægri enn tað Atlantic Petroleum frammanundan hevði mett og minni enn í september. Orsøkin er at trupulleikar vóru á Aoka Mizu-pallinum, sum er á Ettrick-brunninum. Hesir trupulleikarnir eru nú loystir, og framleiðslan gongur sum hon skal aftur.

17. desember kemur Atlantic Petroleum við síni meting av hvørja framleiðslu fyritøkan roknar við í 2015.